# danum



*Naser Khader hevur eisini meiningar um føroysk viðurskifti, og mikukvøldið 4. apríl heldur hann fyrilestur í Miðlahúsinum í Vágsbotni*
Mynd: Polfoto

> ***Irak-kríggið:***
> *Tað var rætt at reka Saddam Hussein frá valdinum. Men eg harmist nógv um tað, sum er hent síðani. Avrikið, síðan Saddam Hussein fór frá, hevur verið út av lagi vánaligt og hálvhjartað. Besta dømi um tað eru teir fáu hermenninir, sum amerikumenn hava valt at nýta í krígnum. Í løtuni nýta hermenninir størstu orku til at verja seg heldur enn at tryggja frið.*

> ***Føroyar:***
> *Eg gleði meg at síggja Føroyar fyri fyrstu ferð. Eg eri spentur at síggja, um mínir fordómar halda.. Eg havi eina fatan av teimum liberalu ungu, sum eru opin mótvegis umheiminum, og hinum, sum hava vent eygunum móti Miðeystri.*

- Islam og demokrati kunnu væl sameinast. Ja, eg veit eg eri selektivur í mínari fatan av islam. Tað veldst um, hvønn skúla tú hoyrir til. Mín skúli hevur ávirkan av tí lutheriska/evangilska/protestantiska kristindóminum, har tú arbeiðir við tveimum regmentum. Her verður sharia býtt í tvey. Sharia, sum tað andaliga og sharia, sum lóg - tað verðsliga, greiðir hann frá

Tey, sum finnast at Naser Khader, halda, at hann er góðvarin, tí eftir teirra meting er islam ein óbrótilig eind av átrúnaði og politikki. Tað ber snøgt sagt ikki til at gera islam demokratiskt, áðrenn islam hevur verið gjøgnum eitt siðaskifti Atfinnararnir halda ikki, at tað ber til at tosa um eitt politiskt islam og síðan eitt átrúnarligt islam, sum Khader vil vera við. Orsøkin til tess er, at Koranin er keldan til alla lóggávu í nógvum muslimskum londum.

Vísir veruleikin eitt nú í Iran og Saudi Arabia, at tey eru langt frá trúðarfrælsi, persónsfrælsi, javnstøðu - og skrivi- og talufrælsi, sum eru grundleggjandi demokratisk rættindi. Er talan ikki um ynskidreymar, tá tú tosar um demokrati og islam?

- Mín grundhugburður er at, vit skulu trúgva upp á tað. Eg veit fullvæl, at søguligar og praktiskar royndir siga nakað annað, men vit MUGU trúgva upp á tað. Hvør hevði væntað fyri 20 árum síðan, at kommunistisku londini í eysturevropa kundi eftir stuttari tíð skuldi gerast demokratisk? Kunnu tey, so kunnu tey muslimsku eisini. Vit mugu ongantíð slaka, tí tað er ein stórur trupulleiki, um 1,5 mia fólk ikki fáa demokrati. Hetta kann elva til stóran óstabilitet, tí søgan vísir, at vegurin fram móti friði og vælferð er demokrati.

Hann vónar at sleppa at uppliva, at islam fær ábøtur og ein nýggja upplýsningartíð. Skal hetta eydnast, er neyðugt, at muslimar, búsitandi í vesturheiminum, ganga á odda. Tí, kunnu teir ikki vísa vegin fram fyri eini sameining av islam og demokrati- so kann eingin.

## Politikarar lifra

Seinastu árini eru greið tekin at hóma, at átrúnaður fær størri og størri ávirkan á politiska lívið – bæði í Føroyum og ikki minst úti í heimi. Fleiri vilja vera við, at fremsta orsøkin til tess er álopið á World Trade Center í 2001. Naser Khader ásannar eisini, at átrúnaður fyllir meira í politikki enn fyri bert nøkrum fáum árum síðan.

- Gud er komin aftur úr kuldanum. Hetta rákið stavar frá seinast í 90-árunum. Vit staðfesta, at flest allar trúðargreinar fáa størri og størri undirtøku, tí fólkið vil aftur til røturnar. Fólk hava brúk fyri onkrum at halda um. Í 20. øld vóru tað tær politisku hugsjónirnar. Hesar hvurvu í ein stóran, tá múrurin fall, og átrúnaðurin fyllir nú hetta tómrúmið.

Naser Khader hevur ongar trupulleikar við, at átrúnaður er farin at fylla meira hjá fólki. Kunnu vit fáa frið við at fólk trúgva, so er tað gott, heldur hann. Hann sigur seg heldur ikki hava nakran trupulleika við fundamentalistum - so leingi, teir halda tað fyri seg sjálvar, og ikki trútta niður í onnur, hvussu tey skulu liva.

Hann heldur kortini lítið um, at politikarar eru farnir at gera sær dælt av, at fólk hava leitað sær til átrúnaðin. Hetta er beinleiðis at lifra fyri fólki.

- Politikararnir vóru skjótir at síggja atkvøður í hesum ráki. Hví skulu Bush og Clinton válka sær í kristindóminum við at lata seg avmynda hvønn sunnudag, tá teir ganga úr kirkjum? Og hví skal Hosni Mubarek (egyptiski forsetin, blðm) ganga í moskum, tá øll vita, at tað besta honum dámar, er at drekka whiskey, spyr Naser Khader og brestur út í sín eyðkenda látur.

## Islamisman fer at veksa

Seinastu árini hava fleiri víðgongdar afturhaldssinnaðar islamiskar rørslur sum Hamas í Palestina, Hizbollah í Libanon og Islamic Brotherhood í Egyptalandi vunnið størri og størri undirtøku. Henda framgongd er ikki við til at elva til eitt meira demokratiskt Miðeystur, tí hesir bólkar mótmæla harðliga vesturlendsku ávirkanina. Men hvat heldur Naser Khader um hesa menning?

- Satt at siga vænti eg, at fleiri av hesum bólkum fara at vinna enn meira fram. Hetta kemst ikki minst av, at fleiri av hesum víðgongdu bólkinum gera eitt rættiligа stórt sosialt arbeiði, sum vit í vesturheiminum hava lyndi at gloyma. Vit hava í áravís kasta nógvar pengar eftir korruptum stjórnum í Miðeystri, sum ikki hava nýtt pengarnar til at betra vælferðina hjá fólki. Hetta eru fólk troytt av, og tí velja tey at stuðla víðgongdum bólkum, sum eitt nú Hamas og Hizbollah, sum siga seg vilja betra vælferðina og koma mutrinum til lívs. Eg havi einki ímóti, at hesir bólkar vinna valini, so leingi teir góðtaka og virða demokratiið. Teir skulu bara ikki forkoma demokratiinum og innføra sharia-lóggávu í staðin, heldur hann.

<u>Keldur:</u>
Portræt: Naser Khader-Reformatoren, Jyllands-Posten 19 februar 2006.
Bókin "Naser Khader og Folkestyret-De første fire år"